## Krøv til brunaatekningar
**Vegleiðing.**

Til øll projekterandi, kommunur og myndugleikar.

**Góðkenning av brunatekningum.**
Brunaumsjón landsins vil við hesum skrivi gera vart við, at tá ið **brunatekningar** vera sendar inn til góðkenningar, áðrenn bygt verður, er neyðugt at lata myndugleikunum liðugtgjørdar brunatekningar saman við fylgiskjali, sum er umsókn til brunamálsviðgerð.

**Fylgiskjal.**
v Navn og bústaður umsøkjarans.
v Navn á bygninginum.
v Bygningsánari.
v Hvar er bygningurin og matr. nr.
v Hvat skal bygningurin nýtast til (Endamál og ætlað fólkatal).
v Tekningsyvirlit.
v O.s.fr.

**Tekningsyvirlit.**
Ø Støðumynd.
Ø Flatmyndir av øllum hæddum.
Ø Skurðmynd/ir.
Ø Síðumyndir av øllum síðum.
Ø Staktekning av bjargingaropi.
Ø Staktekning av glasveggi ella glasi í veggi (BS- ella BD-veggjum).
Ø Staktekning av frávikum.
Ø O.s.fr.

Brunatekningarnar skulu hava í minsta lagi hesi frámerki:

**Tekningshøvd.**

ü Teknings nummar.
ü Navn á bygninginum.
ü Bygningsánari.
ü Hvar er bygningurin.
ü Hvat skal bygningurin nýtast til (Endamál og ætlað fólkatal).
ü Dagfesting av liðugtgjørdari tekning.
ü Mát.
ü O.s.fr.

Brunatekningarnar skulu vera skilligar, og útførdar á slíkan hátt, at allir bygningslutir eru væl lýstir og við frágreiðingum.

**Frágreiðingar um frámerki.**
ü Á svart/hvítum tekningum skulu frágreiðingar vera um tær ser-linjurnar, sum nýttar eru at vísa húsalutir.
ü Um tekningarnar eru í litum, kunnu hesir litirnir nýtast:

- (Reytt) = BS-60
- (Blátt) = BD-90 og BD-60
- (Grønt) = BD-30
- O.s.fr.

Fyri at viðgera tekningar við atliti til brunatrygd, skulu tær m.a. vísa fylgjandi:
**Støðumynd.**
q Fráleika frá grannamarki.

- Skal vera mátføst og vísa umliggjandi umhvørvi – grannahús.
- Atkomuvegir fyri sløkkilið.
- Brandpostar/vatnmongd.
- O.s.fr.

**Flatmynd.**

- Bygging í mark – Eldverjuvegg.
- Verja móti brandsmittu.
- Húsavídd á bygninginum í $m^2$ (Útvendig mát).
- Gólvvídd á hvørjari brunadeild sær.
- Støddir á rúmum í $m^2$ og nýtsla (t.d. sovirúm, goymsla o.s.fr.).
- Brunadeildarveggir skilliga frámerktir.
- BS-, BD-veggir og hurðar, ABDL-skipan o.s.fr. frámerktir/ar.
- Merking av rýmingarhurðum (symbol).
- Merking av rýmingarleiðum (symbol); best við skráskravering.
- Breiddir á rýmingarleiðum.
- Bjargingarop í øllum uppihaldsrúmum (t.d. vindeygu).
- Brandslangur (slanguskáp) (symbol).
- Sløkkiútgerð annars, t.v.s. eldsløkkjarum brandteppum o.t. (symbol).
- ÚT-ljós (yvir rýmingarhurðum).
- Neyðljós (panikljós).
- Fýrrúm.
- Hurð í fýrrúmi.
- Skorsteinur.
- Luftnýggjan (rist í fýrrúmi).
- Pílur í trappum skal vísa gonguleið uppeftir.
- Merki á flatmynd, hvar skurðir eru gjørdir (A-A, B-B o.s.fr.) og pílurin vísir sjón-rætningin.
- Norðurpílur á tekningarnar.
- O.s.fr.

**Skurðmynd.**

- Neyðugastu hæddarmátini, hædd upp til vindeygu, húsahædd o.a.
- BS-, BD-skilagólv og skilaveggir.
- Teknisk frágreiðing um hvønn húsalut sær.
- Longdarskurður í bygningum við hæddarmuni.
- Verja móti brandsmittu.
- O.s.fr.

**Síðumyndir.**

- Lendið, samanborið við bygningin, á øllum síðum.
- Skorstein.
- Hurðar og vindeygu.
- Svala- og trapputilfar.
- Bjargingarop, hvønn vegin tey lata upp og frámerkið “Bj”.
- O.s.fr.

**Stakmyndir.**

- Breidd og hædd á bjargingaropum Ljósop).
- Breidd á rýmingarhurðum (ljósop).
- Øll onnur frávik sum m.a. glasveggir, skjótiveggir, skjótihurðar o.t.
- O.s.fr.

Eru uppklárandi spurningar, eru vit altíð til reiðar at hjálpa.

Hesi dømi eru ávegis.